Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**



Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

**»... eg eri glaður fyri G! – og sum borgarstjóri í kommununi ikki minst errin av tiltakinum...**

JÓHAN CHRISTIANSEN

# Borgarstjóri errin av G!

**ERRIN – Aðrar bygdir hava stevnur og ymiskar festivalar. Vit hava G! Festivalin í okkara kommunu, sum er eitt rættiliga stórt og umfatandi tiltak, ið eg sum borgarstjóri í kommununi eri glaður fyri – og ikki minst errin av, sigur Jóhan Christiansen**

Vilmund Jacobsen

– Eysturkommuna stuðlar grunninum aftanfyri G! Festivalin við 200.000 krónum, og vit kunnu siga, at kommunan soleiðis rindar seg burtur úr hesum. Hinvegin syrgja vit fyri, at ruddiligt er kring um í Gøtu, har festivalgestir koma. Vit sláa gras, seta upp flaggstengur og royna at hava alt so nossligt sum tilber.

Tað sigur borgarstjórin í Eysturkommunu, Jóhan Christiansen, sum er uppvaksin í Leirvík, men hevur mammu úr Gøtugjógv og soleiðis eigur nógvar góðar løtur sum smádrongur og uppveksandi í hesi bygd millum báðar »gøtirnar«.

Nú situr hann sum borgarstjóri í samanløgdu kommununi við skrivstovu við Gøtugjógv.

## Errin borgarstjóri

– Aðrar bygdir hava stevnur og ymiskar festivalar. Vit hava G! Festivalin í okkara kommunu, sum er eitt rættiliga stórt og umfatandi tiltak, ið eg sum borgarstjóri í kommununi eri glaður fyri – og ikki minst errin av.

Jóhan Christiansen heldur fyri, at tað vil altíð vera onkur sum heldur, at hetta tiltak er ov stórt og ógvusligt.

– Men eg haldi, at fólk sum heild eru fegin og errin av, at G! Festivalurin er vorðin eitt afturvendandi tiltak í kommununi, sum við tíðini er vorðið ógvuliga væl fyriskipað – og skipað við øllum tí, sum hoyrir til eitt so umfatandi tiltak, sigur hann.




*Borgarstjórin í Eysturkommunu, Jóhan Christiansen, er uppvaksin í Leirvík, men er hálvur gøtumaður. – Eg eigi nógvar góðar løtur og góð minnir úr Gøtugjógv, sigur hann*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Øll vælkomin

Borgarstjórin í Eysturkommunu bjóðar øllum at vera vælkomnum til bygdar, nú hetta stóra tiltak, sum G! Festivalurin er, enn einaferð verður reist á føtur.

– Vit fara eftir førimuni at taka væl ímóti øllum gestum, sum vitja okkum hesar dagar, festivalurin varar – og øll skulu vera hjartaliga vælkomin, sigur Jóhan Christiansen.

# Ríkt vinnulív á landi og sjógvi

**VINNULÍV Við hækkandi skattaprosenti, nú stórar íløgur verða gjørdar í skúlar í kommununi, er líkt til, at skattainntøkurnar hjá Eysturkommunu fara at halda tørn. – Ríkt vinnulív er í kommununi, og bæði á eldraøkinum og barnaansingarøkinum eru vit væl fyri, sigur Jóhan Christiansen, borgarstjóri**

Vilmund Jacobsen

Inntøkurnar av persónsskatti hjá Eysturkommunu fara í ár at liggja um einar 56-57 miljónir krónur um mánaðirnar, sum eftir eru av hesum árinum, fara at vignast sum higartil í ár.

Borgarstjórin, Jóhan Christiansen, sigur, at stór sveiggj hinvegin eru í inntøkunum av partafelagsskatti, men hesin munar sjálvsagt eisini í kommunukassanum, tá hann kemur.

## Ríkt vinnulív

– Vit hava eitt ríkt vinnulív í kommununi við fjølbroyttum framleiðsluvirkjum, bæði í Gøtu og Leirvík, og hesi arbeiðspláss saman við skiparakstri, ymiskum handverksídnaði og handilsvinnu eru við til at skapa vinnuligu karmarnar hjá fólkinum, sum so aftur geva kommununi inntøkur til rakstur og íløgur.

Jóhan Christiansen sigur, at tá hugt verður eftir vinnuliga virkseminum í Gøtu, er tað serliga fiskavirkið, sum skapar nógv virksemi eins og pelagiski flotin, sum Vinnan rekur, hevur nógvar mans í starvi.

– Í Gøtu hava vit eisini ymiskt handverksvirksemi sum alt tilsamans gevur fólkinum møguleikar og inntøkur, sigur hann.

## Børn og gomul

Bæði Gøta og Leirvík eiga lutfalsliga nýggj eldrasambýlir, eins og kommunan er við í Røktar-og Ellisheiminum í Runavík, sum eisini er útbygt við fleiri røktarplássum.

– Vit eru soleiðis væl fyri á eldraøkinum, sigur borgarstjórin.

Hann vísir á, at á dagrøktarøkinum er Eysturkommuna eisini væl fyri við barnagarði við Gøtugjógv og nýggjum barnagarði við vøggustovu í Leirvík.

– Haraftrat hava vit dagrøktarskipan í kommununi, sigur borgarstjórin.

## Nógv bygging

Jóhan Christiansen sigur, at nógv sethúsabygging hevur verið og er framvegis í Gøtu og Leirvík.

– Nógv er eisini bygt í Syðrugøtu, men nú er einki byggiøki eftir har. Hinvegin eru byggiøkir eftir í Norðragøtu, har eisini nakað av bygging fer fram í løtuni. Í Leirvík eru rættiliga nógv sethús komin upp seinnu árini, og her verður framvegis bygt, sigur borgarstjórin.

Samlaða fólkatalið í Eysturkommunu liggur beint undir 2000, harav sløk 1100 fólk búgva í gomlu Gøtu kommunu og umleið 900 í gomlu Leirvíkar kommunu.